# Yrkisnevndir skapa størri vøkstur

**Fyritøkur, ið hava professionellar nevndir – yrkisnevndir - hava nógv størri framgongd enn tær, hvørs nevndir eru umboðaðar av eigarum, familju ella advokatum. Gongdin í okkara grannalondum er tann, at støðugt fleiri nevndir gerast professionellar**

LEIÐSLA
*Finnur Sivertsen,*
*búskaparfrøðingur*
*Business-Line*
*www.bl.fo*

Tað eru pengar í professionellum, virkisfúsum nevndum við góðum førleikum. Tær fyritøkur, ið hava slíkar nevndir, eru reinar vakstrarrakettur, samanborið við tær, ið hava tilvildarliga samansettar nevndir, ið bert lúka lógarinnar krøv.



*Nýggir nevndarlimir við nógvum royndum og góðum førleikum síggja heimin sum EIN stóran marknað*

## Umsetningurin veksur skjótari

Umsetningurin í meðalstórum fyritøkum við professionellum nevndum økist tvær ferðir skjótari enn í fyritøkum, hvørs nevndarlimir eru eigarar, familja ella advokatar.

Hetta verður staðfest í eini nýggjari frágreiðing hjá ráðgevingarfelagnum PriceWaterhouseCoopers, PwC, har 117 meðalstórar danskar fyritøkur eru kannaðar við atliti til fíggjarligu gongdina, við ella uttan yrkisnevndum.

Kanningin staðfestir, at umsetningurin hjá fyritøkum við professionellum nevndum hækkaði 139% í tíðarskeiðnum 2001-2006, meðan umsetningurin hjá fyritøkum uttan professionella nevnd bara hækkaði 10% hetta sama tíðarskeiðið.

Meðal rentingin av eginpeninginum var eisini munandi hægri hjá fyritøkum, ið hava professionellar nevndir, enn hjá teimum, ið ikki hava tílíkar.

- Kanningin staðfestir enn einaferð tað virðið, ið er í professionellum nevndum, ið kunnu bjóða dagligu leiðsluni av og hjálpa henni við at orða nýggjar strategiskar ætlanir, ið tryggja vøkstur. Nevndirnar arbeiða meira málrættað, og tað gevur úrslit, sigur Kent Hedegaard, ráðgevi hjá PwC.

## Trýst á leiðsluna

Fyrimunirnir við nevndum, hvørs nevndarlimir eru valdir eftir førleika, eru m. a., at tær hava møguleika at styrkja um førleikan hjá dagligu leiðsluni.

Professionellir nevndarlimir verða ofta funnir millum roynd vinnulívsfólk, ið hava vunnið sær eina servitan og koma úr leiðandi størvum. Teir síggja fyritøkurnar við "nýggjum brillum" og síggja nýggjar møguleikar.

Samstundis kunnu yrkisnevndir í nógv størri mun enn virkiseigarar tryggja, at týdningarmiklar avgerðir verða tiknar út frá óheftum, grundleggjandi kanningum.

Ein virkisfús nevnd við góðum førleikum, vil samstundis leggja eitt jaligt trýst á dagligu leiðsluna, ið stendur til svars fyri nevndini. Leiðslan vil tí leggja seg eftir, at náa best møguligu úrslitum.

-Tú fært nýggj, uttanhýsis eygu at skoða fyritøkuna. Hesi skulu bæði geva góðan íblástur og samstundis hava eftirlit við fyritøkuni. Eigarastjórin kann lættliga taka skjótar avgerðir, uttan serliga umhugsan, meðan ein virkin nevnd altíð skal umhugsa og grundgeva fyri sínum avgerðum, sigur Flemming Poulfelt, professari á CBS, Copenhagen Business School, í Keypmannahavn.

## Nýggjan íblástur

Hóast ikki allir virkiseigarar ynskja at lata øðrum týdningarmiklar avgerðir í hendi, eru tað fleiri og fleiri eigarar av smærri og miðalstórum fyritøkum, ið ynskja sær eina professionella nevnd.

- Hetta er ein ásannan av, at tú sjáldan kanst reka eina fyritøku á bestan hátt, uttan at tú javnan fært nýggjan íblástur og møguleika at tosa við serkøn fólk um tær avgerðir, ið skulu takast. Samstundis er óttin hjá eigaraleiðarum fyri at lata onnur fáa innlit í teirra fyritøkur í dag um at vera burtur.

- Sum heild kann sigast, at fyritøkurnar nú síggja fyrimunirnar við virkisfúsum nevndum og tí eru virkiseigarnar meira tilvitaðir um tær. Tá so bankin, advokaturin og grannskoðarin eisini viðmæla hesum nevndum, tá byrja fleiri at umhugsa henda møguleika, sigur Anders Bech, nevndarráðgevi við danska vinnublaðið.

## Føroyar og yrkisnevndir

Verður hugt út yvir vinnuliga landslagið í Føroyum er torført at fáa eygað á professionellar nevndir. Og tó. Tær finnast. So seint sum í ár hava vit sæð, at størsta samskiftifyritøkan í Føroyum hevur sett ein nýggjan nevndarformann, ið hevur gjørt seg galdandi uttan fyri landoddarnar innan kunningartøkni. Ongin ivi er um, at hansara vitan er gott viðføri at hava hjá eini málsøknari fyritøku, ið hevur sett sær fyri, at vinna sær nýggjar marknaðir úti í heimi.

## Heimsins bestu vinnulógir

**Danmark fær felags lóggávu fyri parta- og smápartafeløg, um eitt uppskot verður samtykt í danska Fólkatinginum.**

**Tað metir professarin í vinnurætti, Jesper Lau Hansen, ið er ein av arkitektunum til nýggja lógaruppskotið.**

**- Kemur hetta uppskotið ígjøgnum í politisku skipanini, so fær Danmark ta mest nýmótans vinnulóggávu í Evropa, helst í øllum heiminum, sigur Jesper Lau Hansen, ið er professari við Keypmannahavnar Universitet, sum eisini situr í serligu nevndini hjá Fólkatinginum, ið skal koma við uppskoti um dagførda vinnulóggávu.**

**- Hetta verður tann besta vinnulóggávan í heiminum, tí hon setur felagið í sentrum, og tí hon er meira smidliga innrættað, við ábyrgd til at reka fyritøkuna á ein skilagóðan hátt.**

**Endamálið við nýggju vinnulóggávuni er at minka um fyrisitingarligu byrðarnar hjá m. a. íverksetarum. Uppskotið leggur eisini upp til, at kapitalkravið upp á 125.000 krónur hjá smápartafeløgum skal falla burtur.**

*Business-Line*